UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 13. desember 2021
J. nr.: 21/25144

§ 52a fyrispurningur til Magnus Rasmussen, landsstýrismann, frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um lendisætlan fyri Føroyar og matrikulering

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Er ætlanin at gera eina lendisætlan fyri Føroyar?
2. Um so er, er ætlanin at taka atlit til staðbundnu umstøðurnar í Føroyum?
3. Er ætlanin at taka kommunurnar við í viðgerðina?
4. Er ætlanin at raðfesta matrikulering hægri í Føroyum?

Svar til nr. 1
Sum spyrjarin vísir á í viðmerkingunum til spurningin, mugu vit ásanna, at lendið er avmarkað og tí er umráðandi at hugsa seg væl um, tá ætlanir verða gjørdar fyri, hvussu lendið skal brúkast til gagns fyri fólk, fæ og náttúru. Nógv lendið er longu innlagt til bygging av ymsum slagi, bøgarðar eru við fólkavøkstri og øktum vinnuligum virksemi fluttir longur niðan, nógvastaðni eru útfyllingar gjørdar í sjóvarmálanum til havnir, virkisøki og bústaðarbygging, meðan tað aðrastaðni eru boraðir tunlar til virkisgoymslur o.a. virksemi. Skilligt er, at økt virksemi og økt fólkatal økir um tørvin á lendi til ymisk endamál og tá er tað landbúnaðarjørðini, sum tikið verður av. Í Føroyum er tað soleiðis, at alt lendi upprunaliga er flokkað sum landbúnaðarjørð til tað við býarskipan og byggisamtykt verður lagt til onnur endamál.

Tað eru fyrst og fremst kommunurnar, sum við lóg hava fingið heimild at tilrættisleggja, hvussu lendisnýtslan í teirra kommunu skal vera. Tí eru tað í veruleikanum 29 sjálvstøðugir myndugleikar, sum hava rætt til at gera eina lendisætlan fyri brúki av lendinum. Aðrir myndugleikar hava eisini sjálvstøðuga lógarheimild at gera ætlanir, sum gera inntriv í ella avmarka brúks- ella ræðisrættin á lendi: Landsverk hevur rætt til at gera ætlanir um framtíðar vega- og tunnilsgerð, Umhvørvisstovan hevur rætt til at gera ætlanir um orkuútbyggingar, Yvirfriðingarnevndin og landsstýrismaðurin hava rætt til at friða ávís náttúruøki, meðan aðrar ætlanir stundum verða samtyktar av Løgtinginum við verklagslóg o.s.fr.

Við dagsins talgildu tøkni eru møguleikar at savna dátur um flest allar góðkendar lendisætlanir í einum felags framsýningarglugga, sum vit eitt nú kenna frá Føroyakort.fo ella kortal.fo. Eitt slíkt arbeiði krevur neyva fyrireiking og at krøv verða sett um eitt nú standardisering av upplýsingum í góðkendum byggisamtyktum og øðrum ætlanum og at upplýsingar um ætlanirnar – saman við kortum - verða sendar í talgildum formati til tann stovn, sum skal savna, skráseta og dagføra

slíkar dátur. Tá ið hetta er gjørt, hava vit skapt fortreytirnar fyri eini yvirskipaðari lendisætlan, um politiskt ynski skuldi verið um tað.

Svar til nr. 2
Við avmarkaðum lendi eru nógv atlit at taka í mun til staðbundin viðurskifti í sambandi við lendisætlanir og -nýtslu. Býarmenning, økt vinnuligt virksemi, nýggjar vinnur, fólkavøkstur o.a. er atvoldin til, at neyðugt er við útbyggingum nógvastaðni og tí slepst ikki undan at gera seg inn á uppdyrkaðan bø og hagalendi til útbyggingarnar.

Tá kommunur gera ætlanir um lendisnýtslu, skal ætlanin sambært lóg leggjast fram í almenna hoyring. Tá ber til hjá borgarum, vinnurekandi og øðrum áhugaðum at leggja síni sjónarmið um ætlaðu lendisnýtsluna fram fyri kommununi. Somuleiðis kunnu myndugleikar sum eitt nú Búnaðarstovan, ið umsitur festijørðina og áhugafelagsskapir, gera síni sjónarmið galdandi, tá talan er um at taka bø, haga ella náttúrurík lendi til onnur endamál.

Samanumtikið kann sigast, at tað er tilrættisleggjandi myndugleikin, sum hevur ábyrgd av at tryggja, at atlit verða tikin til staðbundin viðurskifti av ymsum slagi og at ætlanir og inntriv eru proportional við tørvin á útbygging og at mett verður, um tað eru aðrir meiri skynsamir møguleikar enn júst har, kommunan hevur ætlað at fremja útbyggingina. Yvirskipað sæð kann góðkennandi landsmyndugleikin sýta fyri at góðkenna eina ætlan, sum gongur ímóti týðandi áhugamálum, men tá vil oftast vera talan um áhugamál av breiðum samfelagsligum týdningi heldur enn staðbundnum týdningi.

Svar til nr. 3
Víst verður til svarini til spurning 1 og 2. Leggjast kann afturat, at allar kommunur og allir landsmyndugleikar, sum leggja ætlanir um nýtslu av lendi til ymisk endamál, hava fyrisitingarliga skyldu til at meta um, hvørt teirra ætlanir um framtíðar lendisnýtslu raka áhugamálini hjá øðrum, tað verið seg alment sum privatrættarliga.

Við tað at øll lendisnýtsla skal skipast við byggisamtykt, slepst ikki uttanum kommunurnar, landsins býarskipanarnevnd og góðkennandi landsmyndugleikan, tá lendisætlanir skulu góðkennast. Tað er eisini tí at kunngerðin um kommunala byggimálsviðgerð frá 2001 eintýðugt ásetur, at "kommunustýri kunnu ikki geva byggiloyvi ella nýtsluloyvi, fyrr enn tað er staðfest, at tað sum søkt verður um, eisini kann góðkennast av øðrum myndugleikum, ið sambært aðrari lóggávu hava heimild at seta krøv til byggingar." Við hesum er lógarfest, at hvør myndugleiki umsitur áhugamálini innan sítt øki og at ongin myndugleiki kann "yvirtrumfa" ein annan myndugleika og hetta hava kommunurnar eitt yvirskipað eftirlit við í sambandi við, at kommunurnar skulu loyva allari bygging í kommununi.

Svar til nr. 4
Allar Føroyar eru matrikuleraðar og tí fevnir matrikuleringsarbeiðið í dag mest um matrikulering av eigindómum í sambandi við nýbygging, sundurbýti og útskifting. Í góðum tíðum við øktum byggivirksemi er vanliga longri bíðitíð eftir at fáa matrikuleru viðurskiftini avgreidd eins og tað til tíðir eisini hava verið longri bíðitíðir eftir at fáa tinglýst skjøl.

Hesi seinnu árini hevur bygging av íbúðarbygningum rættiliga tikið dik á seg, og við slíkum bygningum eru búeindirnar, sum koma upp í senn og sum skulu matrikulerast, nógv fleiri. At matrikulera ein eigindóm krevur eitt nú, at ein umsókn um matrikulering verður latin inn, at eigindómurin verður máldur upp, teknaður og lýstur á rættan hátt, at ognarheimildir verða eftirkannaðar og at eigindómurin verður førdur inn á matrikulkort við ávísum upplýsingum. Flest øll kenna úrslitið, sum er alment atkomuligt á føroyakort.fo og kortal.fo.

Umhvørvisstovan er farin undir at eftirmeta innanhýsis arbeiðsgongdir og samskifta úteftir við umsøkjara, byggiharra, avvarðandi kommunu o.o. fyri at kanna, um til ber at lætta um arbeiðsgongdir og samskifti millum partarnar í tilgongdini at matrikulera ein eigindóm, har talgilt samskifti og talgildar upplýsingar helst vera týðandi tættir. Vónandi fer hetta arbeiðið at føra til, at enn meiri ferð kann setast á matrikuleringsarbeiðið í framtíðini, so matrikulmyndugleikin ikki gerst fløskuhálsur, tá nýggir bygningar eru lidnir og klárir at handa eigaranum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 13. desember 2021

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður